Skúlastýrisfundur 24.11.2025

Møtt vóru: Rakul Borg Brattaberg, Marin Gaardlykke (fyri Rakul í Lágabø), Jónleyg Finnsdóttir, Barbara Brattaberg, Hjørdis Simonsen og John Henrik Holm, skrivari.

Hans Allan hevur boða Rakul B. Brattaberg frá at hann er sjúkur

Skrá:

1. **Skúlalaðið og trappurnar**
2. **Námsferðir – Vegleiðing og støðutakan**
3. **Takið**
4. **Orðblind og vegleiðing/hjálp frá skúlanum**
5. **Skíggjapolitikkur**
6. **Felags foreldrafundur (skúlastýrið skipar fyri)**
7. **Ymiskt**

Ad. 1

Hans Allan hevði ynskt at fáa skúlalaðið og trappurnar í skúlagarðinum á skrá. Nú Hans Allan er sjúkur verður hetta mál útsett til næstu ferð.

Ad. 2

Nú kjaki hevur tikið seg upp um námsferðir í almennu miðlunum. Hevur skúlastýrið á seinasta fundið ynskt at takað hetta mál upp í skúlastýrinum. Skúlastýrið hevur hugt at skúlum, sum hava leiðreglur á økinum. Skúlastýrið hevur heitt á skúlastjóran til at hava eitt uppskot klárt til komandi skúlastýrisfund. Hetta so at skúlastýrið hevur nakað ítøkiligt at takað støðu til.

Ad. 3

Skúlastýrið eftirlýsir at umsitingin í kommununi setur í gongd arbeiði so at takið í nýggja skúla verður tætt. Vit hava nú í fleiri ár staðfest at tað lekur inn í fleiri støðum. Skúlastýrið samtykti at foreldraumboðini skuldi biðja um ein fund við borgarstjóran fyri at fáa glið á viðlíkahaldsarbeiði í skúlanum. Skúlastýrið er samt um at skúlin krevur umfatandi viðlíkahald og at húsavørður skúlans ikki hevur orku at gera hetta einsamallur.  Tí er eitt hugskot at arbeiðsfólkini hjá kommununi leggja nakrar arbeiðsdagar á skúlanum fyri at hampa um.

Ad. 4

Formaðurin hevði ynskt eina kunning um orðblindavirksemi skúlans.

Mannagongdir skúlans:

Næmingarnir verða kannaðir eftir jól, tá teir ganga í 3.flokki. Teir, ið enda á "reyða ella gula" markinum – tey, ið síggja út til at hava orðblindatrupulleikar ella liggja á markinum verða koyrd í eina tilgongd, har førleikastova, flokstoymi og leiðsla finna fram til, hvussu og hvat næmingurin skal hava eyka hjálp og stuðul til.

Hesir næmingar verða síðani kannaði aftur áðrenn summarferiuna fyri at vita, um hesi hava gjørt nøkur framstig og um tiltøkini, ið vórðu sett í verk, hava havt nakra ávirkan.

Teir næmingar, ið verða kannaðir aftur og framvegis liggja undir markinum fyri ”orðblindatrupulleikum” skulu í 4.flokki fáa neyðugu hjálpina og stuðul til at menna sínar skrivi/ og lesiførleikar. Eisini skulu orðblindu næmingarnir fáa hjálp og læra seg at brúka teldu, IntoWords, ljóðbøkur o.a.

Vit leggja  dent á undirvísing av hjálpitólinum IntoWords og telduarbeiði.

Tað eru nú 2 tímar settir av um vikuna til hádeild og 2 tímar til miðdeild, sum beinleiðis verða brúktir til IntoWords undirvísing.

Onnur undirvísing av orðblindum næmingum er eisini hvørja viku, har dentur m.a. er lagdur á lesi- og skriviførleikar.

Umframt hetta, so verður roynt at fáa orðblindapatruljuna upp at koyra aftur.

**27.novembur frá 19.00-21.00** verður undirvísing fyri foreldrum og avvarðandi í at nýta IntoWords á teldum. Skúlin hevur teldur, men best er, um tit taka teldurnar hjá tykkum sjálvum ella børnum tykkara við.

Ad 5.

Skúlin hevur seinastu vikurnar hildi fleiri foreldrafundir og kunnað um árinini av ov nógvari skermnýtslu. Foreldur at børnunum í 1. – 3. Flokki hava tikið saman hendur og gjørt av at børn teirra skulu als ikki hava snildtelefon.  Heldur ikki heima.

Ad. 6

Verður uppaftur tikið á næsta fundi.

Ad. 7

Einki var undir ymiskt.

| | |
|---|---|
| Rakul Borg Brattaberg | Marin Gaardlykke |
| Barbara Brattaberg | Jónleyg Finnsdóttir |
| Hjørdis Simonsen | Hans Allan Niclasen (lisið) |